# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samgongu-samráðingar

Realitetssamráðingar eru nú millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin um at skipa nýtt landsstýri. Ì formansumfarinum gjørdu umboðini fyri ABC flokkarnar greitt, at tey fóru at hittast sunnudag. Meðan formenninir í C og A vórðu meira avgjørdir, so var formaðurin hjá B eitt sindur meira lunkaður."Tað er vanligur fólkaskykkur at taka ein fund" var hansara viðmerking. Hvussu hetta skal tulkast fara komandi dagarnir at vísa.

Einki er liðugt fyrr enn alt er liðugt. Vit loyva okkum tí at ívast í, um realitetssamráðingar merkir, at vit fáa eina ABC samgongu tá avtornar skulu vit ganga eftir útmeldingum frá umboðum fyri flokkarnar eftir valið. Sjálvstýrisvongurin í Fólkaflokkinum fekk dygga undirtøku, og hevur nývaldi tingmaðurin Poul Michelsen gjørt greitt, at hann ynskir eina smala sjálvstýrissamgongu. Helst AED. Tað verður áhugavert at síggja, um Kallsberg, Niclassen og á Lakjuni vilja fara í samgongu við E, sum teir hava roynt áður. Tungan á vágskálini í A millum hesar báðar bólkar verður so nýggi tingmaðurin og atkvøðuslúkurin Jákup Vestergaard. Her verður tað eisini áhugavert at fylgja við í, um hann hevur vaskað talvuna reina ella um sárið hann fekk í undanfarnu samgongu, tá løgmaður segði hann úr starvi, er lekt. Hvussu fegin man hann vera at fara í samgongu við tí løgmanni, sum tveitti hann úr Tinganesi? Greitt er at, Fólkaflokkurin fer at seta yvirtøkukrøv, sum Sambandsflokkurin kann fáa ilt við at góðtaka.

Sambandsflokkurin gongur eisini í bólkum. Hóast formaðurin fekk fleiri atkvøður enn ein av kappingarneytunum, Edmund Joensen, so fekk nýggi maðurin Magni Laksáfoss nógv flestar atkvøður. Spurningurin er eisini í hvørjum leiri vit fara at finna nýggju tingkvinnu floksins, tá avgerðin skal takast um samgongu. Neyvan hoyrir hon til meira "sjálvstýrissinnaða" vongin í flokkinum og kann hon tí gerast tungan á vágskálini, tá tingfólkini skulu gera av, antin tað verður ein ABC samgonga ella man vil loyva Tjóðveldinum inn í hitan.

Javnaðarflokkurin misti eitt tingfólk, og tí er hann kanska ringast fyri í júst hesi samgongukonstellatiónini. Ganga hinir við til at hann varðveitir løgmanssessin, og gera teir tað fær hann so eisini landsstýrissess, hóast hann hevur færri tingfólk! Hóast javnaðarfólk hava funnist at, at teirra formaður hevur verið ov lítið javnaðarmaður í undanfarnu samgongu, so kemst tó ikki uttan um, at løgmaður hevur verið sera loyalur mótvegis sínum samgongupartnarum. Nakað, sum ger, at teir helst vilja, at hann skal halda fram – men helst fara teir í hvør sínum lag at krevja meira dynamikk í leiðsluni, soleiðis at EU málið og sjálvstýrismálið verða raðfest hægri.

**Sosialurin**

## Valagn, ikki valgflesk
## Framtíðin kemur ikki av sær sjálvum

**EYÐUN Á BORG**
Við málsligari valkvøðu



VALAGN: Havi í valstríðnum fleiri ferðir hoyrt orðið, valflesk / valgflesk. Hatta er danskt. Latið okkum heldur brúka ta meiri føroysku myndatalauna, valagn. Agn smakkar annars frálíka væl, sigst.

Sagnorðið, at egna, bendist / stavast: egnaegnir- egndi-egndu-egnt.

FRAMTÍÐIN: Í valstríðnum segði / skrivaði onkur, at framtíðin kemur av sær sjálvum. Tað er ikki rætt. Framtíð er kvennkyn, og tí eiga vit at siga / skriva: Framtíðin kemur av sær sjálvari (kvennkynsending). Onkur segði tað tó rætt.

FORMANSRUNDA: Har er talan um fleiri formenn. Man tað ikki eita formannaumfar? (manna, hvørsfall fleirtal).

ENSKT / DANSKT í valstríðnum: Eina sera skilagóða valgrein sá eg í bløðunum um enskt / danskt í skúlanum. Ein ungur tjóðveldismaður, sum eitur Rógvi, mælti til at býta enskt og danskt um, soleiðis at vit hava meira enskt og minni danskt.

Hatta eru vísdómsorð. Danskt er hent og neyðugt at duga; men vit brúka alt ov nógvar tímar til eitt mál, sum nógvir skúlanæmingar longu duga, tá teir koma í 1. flokk (teknifilmar o.s.fr.).

Enskt, altjóðamálið, sum ikki liggur so tætt upp at føroyskum, er alneyðugt at duga betur.

VALGRESULTATIÐ: Eg meini valúrslitið. Ja, úrslitið gjørdist, at sambandsflokkarnir báðir einans fingu um 40% tilsamans. Man tað fara at gagna móðurmálinum og málrøktini? Ups, politisk málrøkt! (Hví koma valúrslitini so seint av Argjum og úr Klaksvík?).

RÆTSSIKKURHEIT og MIÐFLOKKAFÓLK: Nógv siga og skriva framvegis miðflokkafólk. Talan er um ein Miðflokk. Miðfloksfólk er tískil tað rætta. Eingin sigur Sambandsflokkafólk.

Rætssikkurheit, segði onkur. Rættartrygd er føroyska orðið. Hugsi nú um Jenis av Rana. Mundu vit, føroyingar sum heild, gjørt meir vart við okkum, um tað var onkur annar politikari ella annar persónur, sum noyddist at bíða so leingi í óvissu eftir útlendska dómsvaldinum í Føroyum?!?

RUNDKOYRING: Góð mynd hjá Høgna um samgonguna. Men tað ber ikki til at ákæra løgmann fyri at koyra til høgru í rundkoyringini. Í eini rundkoyring koyra vit til vinstru!

L-FLOKKURIN: Framúrskarandi verkætlan hjá unga argjamanninum og hansara ungu hjálparum í Hoydølum. Til lukku! (Hoydalaflokkur, ikki Hoydalsflokkur).

Stemmaði tú á valginum? Eg meini:Atkvøddi tú á valinum?

E. S. Takk fyri málkvøðuna úr Bangkok, Jón G!

Takk fyri málkvøðuna, Kai!

Á Borg á Argjum á brøðramessu 2007

## Føroyingar valdu at taka framtíðina aftur

**HØGNI HOYDAL**



Av sonnum vil eg siga takk fyri stuðulin til løgtingsvalið 19. januar. Til øll tykkum, sum hava stríðst og kýtt tykkum at geva tjóðveldishugsjónini undirtøku. Og til øll tykkum, sum valdu at atkvøða fyri Tjóðveldinum.

Ein serstøk tøkk til tykkum, ið stillaðu upp og stríddust, men sum ikki rukku á mál hesaferð. Somuleiðis takki eg teimum mongu, ið stuðlaðu mær persónliga og ynski nývaldu tinglimunum tillukku.

Valúrslitið var ein greiður sigur fyri bæði Tjóðveldið og fyri frælsishugsjónina. Tjóðveldið fekk somuleiðis váttan frá veljarunum um, at vit sum nútímans flokkur ganga fremst innan javnstøðu.

Valið prógvaði, at føroyingar vilja hava framtíðina aftur.

Hyggja vit út um bókstavavaldið í føroyskum politikki og ístaðin leggja dent á politisku boðskapirnar, sum flokkarnir eru farnir til val uppá, er valúrslitið týðiligt.

Ein stórur meiriluti vil skipa Føroyar sum frælst land, ið stendur á egnum beinum fíggjarliga.

Ein stórur meiriluti vil at Føroyar skulu út í heim sum sjálvstøðugt land.

Ein stórur meiriluti vil hava skil á búskapin og gera upp við skeiva skattapolitikkin.

Ein stórur meiriluti vil hava eitt frælst vinnulív.

Ein stórur meiriluti vil hava útbúgving, gransking og mentan í hásætið.

Ein stórur meiriluti vil hava ein veruligan umhvørvispolitikk.

Ein stórur meiriluti vil hava eitt samhaldsfast samfelag við veruligum sosialpolitikki fyri teir bólkar, ið tørva mest.

Í øllum hesum málum og øðrum við, er Tjóðveldi lykilin og kann broyta fastlæstu støðuna til visjónir og áræði.

Fyri fólkaræði heiti eg á øll um at siga sína hugsan við teir politikarar og flokkar, sum tey stuðla: Vit kunnu ikki halda fram við somu samgongu eftir eitt slíkt valúrslit.

Vit hava skyldu at virða veljarans avgerð og fremja broytingina.

Við bestu kvøðum

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.